Bjarni Djurholm, landsstýrismaður:

# – Gevur nakað at hugsa um

**Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, gjørdist ikki sørt skelkaður av, at hann fríggjadagin bleiv hóttur eftir lívinum**

Hóttan
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Bjarni Djurholm greiðir frá, at ein maður, sum fleiri ferðir seinastu tíðina hevur verið á vitjan í Vinnumálaráðnum, fríggjadagin vendi sær til umsitingina hjá ráðnum umvegis telefonina og segði, at hann umhugsaði at koma oman í ráðið at gera enda á landsstýrismanninum.



*Fríggjadagin bleiv landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, hóttur eftir lívinum. Landsstýrismaðurin er ikki sørt skelkaður av tilburðinum, hóast hann vónar, at talan var um eina tóma hóttan.*

*savnsmynd*

### Vónandi tóm hóttan

– Eg havi sjálvur havt fleiri vitjanir av manninum seinastu tíðna, men tað hevur í sjálvum sær einki skelkandi verið í tí. Men hóttanin fríggjadagin er sjálvsagt einki serligani hugalig, og aðalstjórin valdi eisini beinan vegin at boða løgregluni frá, greiðir Bjarni Djurholm frá.

Landsstýrismaðurin sigur seg vóna, at talan var um eina tóma hóttan, men sambært løgregluni verður maðurin mettur at verða ikki heilt vandaleysur.

– Løgreglan ringdi til mín fríggjakvøldið og greiddi frá, at maðurin var tikin inn til avhoyringar, og at hann nú verður skuldsettur. Teir heittu eisini á meg um at hava eyguni eftir mær sjálvum, og tað má tulkast sum um, at maðurin ikki er heilt vandaleysur, sigur Bjarni Djurholm, sum hugsar mest um sini nærmastu í sambandi við hendingina.

Nú eru skjótt seks ár síðani, at Bjarni Djurholm gjørdist landsstýrismaður, og sambært honum hava fólk sum heild verið stak fyrikomandi.

– Eg havi stórt sæð ikki havt nakra keðiliga upplivning, og so als ikki nakað, ið kann samanberast við tað, sum fór fram fríggjadagin. Fólk hava verið ógvuliga fyrikomandi, og eg havi kent meg púrasta tryggan. Sjálvsagt hava tað verið summi, ið hava skeldað um okkurt, men soleiðis vil tað altíð verða, heldur Bjarni Djurholm.

### Ikki longur eitt opið aðalráð

Hóttanin hevur eisini fingið avleiðingar í Vinnumálaráðnum. Aðalstjórin, Arne Poulsen, hevur nevnliga gjørt av, at nú skulu øll vitjandi boða frá í móttøkuni, tá ið tey koma á vitjan í Vinnumálaráðnum.

– Áður hava fólk kunna komið og farið, sum teimum lystir í ráðnum, og tað hevur sum heild virkað væl, men nú verður hetta broytt. Aðalstjórin hevur mælt til, at øll vitjandi nú skulu boða frá, og tað havi eg sjálvsagt tikið til eftirtektar, hóast eg haldi, at tað er stórt spell, greiðir Bjarni Djurholm frá.

Maðurin, ið hótti landsstýrismannin eftir lívinum, bleiv eftir avhoyringar fríggjadagin latin leysur aftur, men hann verður skuldsettur.

# Maðurin er skuldsettur

Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni, sigur, at maðurin, sum friggjadagin hótti Bjarna Djurholm, er avhoyrdur og skuldsettur. Málið verður nú sent víðari til fútan.

– Fríggjadagin fingu vit ein fráboðan um, at ein persónur hevði hótt landsstýrismannin eftir lívinum. Maðurin bleiv tikin inn á støðina til avhoyringar, og vit hava gjørt av at skuldseta mannin. Málið verður nú sent fútanum, sum skal skriva ákærurit, greiðir Bergleif Brimvík frá.

tn

## Tvey harðskapsmál

Løgreglan hevði heilt fitt at gera um vikuskiftið, og rættuliga ofta var boð eftir teimum. Í flestu førum fekk løgreglan tó loyst trupulleikarnar á staðnum, men í onkrum føri var tó neyðugt at fara víðari við málunum. Løgreglan hevur skrásett tvey harðskapsmál, har nevarnir hava verið nýttir. Eisini bleiv ein bilførari um vikuskiftið tikin fyri at koyra við kenning.

tn



*savnsmynd*

## Seks prutl tikin inn

Ferðsluløgreglan var í farnu viku úti og hevði eitt seliga vakið eyga við tey mongu prutlini, ið eru í ferðsluni. Hetta gav eisini úrslit, tí ikki færri enn seks prutl vóru tikin inn á politistøðini, annaðhvørt tí tey eru ólóglig ella er illgruni um tað. Prutlini verða nú kannað nærri, áðrenn farið verður víðari við málunum, upplýsir vakthavandi á politistøðini í Havn.

tn



## Fleiri koyrdu ov skjótt

Farna vikuskiftið var løgreglan úti og tók ferðmátingar í undirsjóvartunnlinum, og tað gav úrslit. Málitólið hjá løgregluni skrásetti átta bilar, ið koyrdu ov skjótt. Teir átta bilførararnir, ið vóru tiknir fyri at koyra ov skjótt í undirsjóvartunnlinum, koyrdu millum 101 og 113 kilometrar um tíman, verður upplýst á politistøðini í Havn. Bilførararnir, ið blivu tiknir, kunnu vænta sær eitt bræv frá fútanum í næstum.

tn